# Janus og Ingálvur í bronsu

**Fríggjadagin verða teir báðir føroysku listamenninir heiðraðir á samkomu á Listaskálanum**

LIST
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er fyri drúgva og slóðbrótandi arbeiðið, sum teir báðir, Janus Kamban og Ingálvur av Reyni, hava framt fyri og í føroyskari list seinastu mongu árini, at Listafelagið nú fer at heiðra teimum báðum.

Pál Weihe, formaður í Listafelagnum, sigur, at tey í nevndini hava tosað um hetta at heiðra ávísum listafólkum, og sum hann tekur til, so var tað ikki tann stóri ivin um, at talan skuldi verða um teir báðar.



*Umframt listarligu avrikini, verður Janus Kamban eisini heiðraður fyri arbeiði sítt innan Listafelagið og Listaskálan*



*Fyri at hava ført føroyska myndlist inn í 20. øld, stendur millum annað í grundgevingunum fyri heiðrinum til Ingálv av Reyni*

- Hetta eru jú the Grand old men í føroyskari list, og tað er einki at ivast í týdninginum, sum teir báðir hava havt fyri føroyska list, heldur formaðurin.

Hann sigur víðari, at tað í grundgevingunum fyri, at Ingálvur av Reyni skal hava virðisløn, millum annað verður víst á: At hann hevur ført føroyska myndlist inn í 20. øld. Serliga við atliti til abstraktu listina, har hann við hegni hevur ment listina, soleiðis at hann í dag er vorðin bæði ein fyrimynd og eitt álit innan føroyska myndlist.

Um Janus verður sagt: Við eini støðugari tráan eftir at fáa styrkt um kjarnina í listini, hevur hann hevur við stórum hegni ment føroyska høgmyndalist til tað, sum hon er í dag. Ikki minst er úrslitið av hesum sjónligt við minnisvarðunum, sum standa kring landið, og sum eisini sýna listarligu víddina í arbeiði hansara. Og hartil hevur Janus gjøgnum árini verið ein av drívmegunum í Listafelagnum.

Móttøkan fyri teimum báðum verður í Listaskálanum fríggjadagin kl. 16. Á høvuðmyndir av teimum báðum avdúkaðir. Talan er um høvuðmyndir, sum eru stoyptar í bronsu, og er tað Hans Pauli Olsen, sum hevur staðið fyri hesum.

Hartil verður talan eisini um tónleik, røður og okkurt ábit.




Leiðari til eldraøkið

## Ert tú rætti leiðarin

Tú hevur hugsanir um, hvussu eldraøkið kann mennast frameftir. Tær dámar avbjóðingar, og tú hevur evnini at leiða og motivera eitt ymisligt lið av leiðarum við ymisligum arbeiðsumstøðum.

Ljóðar hetta sum tú? So er eitt spennandi starv sum leiðari fyri eldraøkið leyst at søkja. Økið er í støðugum vøkstri, og tí krevst ein framsíggin persónur við góðum leiðaraevnum, ið setir framburð og trivnað í hásætið.

**Bygnaður og starv**
Deildin fyri eldraøkið er skipað undir Heimarøktini og Serforsorgini. Deildin fevnir í høvuðsheitum um heimarøktina og ellis- og røktarheimini. Virksemið er kring alt landið. Deildin umsitur fyri uml. 250 milliónir krónur árliga. Tað eru í løtuni uml. 845 starvsfólk innan økið, harav 455 starvast í Heimarøktini. Leiðarin arbeiðir í tøttum samstarvi við økis- og stovnsleiðarar um alt landið.

Leiðarin hevur ábyrgd mótvegis stjóranum í Heimarøktini og Serforsorgini.

Umframt deildina fyri eldraøkið eru fýra aðrar høvuðsdeildir undir Heimarøktini og Serforsorgini, og tí gongur leiðarin inn í eitt kollektiv av leiðarum.

Arbeiðsplássið er dynamiskt og umsitur eina sera týðandi samfelagsskipan. Økið hevur stóran almennan áhuga, tí tað fevnir um tænastu til nógv fólk, og tað er ein avbjóðing at liva upp til krøvini við teimum fíggjarligu kørmum, sum politiska skipanina setir.

Talan er um eitt tað størsta arbeiðsplássið í Føroyum, og tað økist, so hvørt fleiri uppgávur verða fluttar út í primeru heilsutænastuna.

**Uppgávur og krøv**
Leiðarin hevur fíggjarligu, fyrisitingarligu og fakligu ábyrgdina á øllum økinum. Uppgávurnar eru sera fjølbroyttar, og eingin dagur er eins.

Starvið krevur, at tú hevur viðkomandi útbúgving og hollar leiðslu- og starvsroyndir. Persónliga krevst, at tú hevur breiðan rygg og ert týðiligur. Leiðarin má eisini hava hegni og evni at koma fram til framtíðarloysnir og fremja tær í verki. Tað krevur millum annað, at tú dugir at skapa sambond og varðveita tey. Tú skal vera savnandi og skapandi, tí einki verður framt uttan í samstarvi við onnur.

Starvið gevur tær ávirkan, tú kemur í samband við nógv fólk og hevur góðar møguleikar fyri eftirútbúgving.

Um fleiri upplýsingar ynskjast ber til at ringja til Meginskrivstovuna á telefon 304020 og tosa við Mary J. í Garði, stjóra.

**Umsókn og freist**
Umsóknarfreistin er mánadagin 5. september 2005, og starvið verður sett skjótast tilber. Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðkomandi skjølum skal sendast til:

Heimarøktin og Serforsorgin
Att: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
Postboks 3037
FO-110 Tórshavn

Heimarøktin og Serforsorgin
Eirargarður 2, 2. hædd, Tel 304020, Fax 304010, heimser@heimarokt.fo

www.sansir.fo